# Kirkjan ikki ein forngripagoymsla

**- Kirkjufólkið hevur ongantíð havt eitt forum, har viðurskifti hava verið umrødd, sigur Uni Næs, ið skjýtur upp, at møguliga eiga vit at hava eitt kirkjuting av og á. Hann heldur ikki, at fólk høvdu strikað sín limaskap í Fólkakirkjuni, um kirkjuskattuin hækkaði og fólk samstundis sóu, hvat peningurin varð brúktur til**



*Uni Næs setur spurnartekn við, um tíðin ikki er komin til, at møguleiki skal vera fyri at taka pening fyri atgongumerki til kirkjukonsertir. Hann ásannar tó, at hetta krevur eitt kjak. Og kjak heldur hann okkum tørvar*

*Mynd: Høgni Thomsen*

BISKUPSVAL
*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*

Uni Næs er sóknarprestur í Fuglafjarðar prestagjaldi og hevur áður starvast sum prestur í Norðstreymoyar og Suðurstreymoyar vestara prestagjaldi. Hann hevur eisini verið nevndarlimur í Prestafelagnum og álitismaður hjá prestunum.

*Hví hevur tú valt at lata teg stilla upp sum bispur?*

- Eg meti meg hava góðar royndir í arbeiðnum sum prestur, sum kunnu brúkast í arbeiðnum sum bispur. Umframt tað hava stillarar heitt á meg, og hetta taki eg sum eina álitisváttan, sigur Uni Næs. Hann heldur eisini at hansara royndir innan fyrisiting kunnu koma kirkjuni til góðar.

- Eg havi eisini royndir frá øðrum kirkjuligum arbeiði, sigur Uni Næs og nevnir m.a. tey árini hann var skrivari í KFUM umframt starvstíðina í tilsamans 16 ár higartil sum prestur. Hann var útbúgvin guðfrøðingur í Århus í 1986, og tvey ár seinni varð hann prestvígdur. Eina tíð fekk hann lestrarstyrk at granska føroyska kirkjusøgu á Fróðskaparsetrinum.

*Hvussu ætlar tú tær at vera ein góður leiðari fyri prestarnar og kirkjuna annars í Føroyum?*

- Ein góður leiðari eigur at vera væl kunnaður um bæði sítt egna øki og uttanfyri. Eingin megnar alt einsamallur. Tí er neyðugt við góðum fólki afturat sær í fyrisitingini og í kirkjuráðunum. Tað er neyðugt við góðum samskifti, sigur Uni Næs.

## Arbeiðið hjá presti ikki altíð sjónligt

Fuglfjarðar prestur leggur dent á, at tað ikki altíð kemur fram ljósmála, hvussu gerandisdagurin hjá einum presti sær út.

- Prestur ger eitt stórt arbeiði í kirkjuni og í samfelagnum sum heild. Ikki alt sæst ella hoyrist, sigur Uni Næs og sipar til ta serliga strongu tagnarskylduna hjá prestum.

- Hetta minnir um eitt ísfjall. Bara ein brotpartur sæst, so tungar byrðar liggja á herðunum hjá prestum, og tú kanst møta kulda. Men eg plagi at ugga meg við, at ísfjallið er hvítt, sum er tekin um gleði og reinleiki, og tað er hetta, sum skal boðast, sigur Uni Næs í síni myndatalu.

Hann metir tí, at bispur skal stuðla prestunum, og sjálvur nevnir hann evni sum t.d. eftirútbúgving, arbeiðstíðir og bústaðarviðurskifti, sum kunnu bøtast.

Harafturat heldur Uni Næs, at bispur eigur at vera saman við kirkjuráðslimum og kirkjutænaraum og stuðla tí sjálvboðna arbeiðnum.

- At vera sjónligur og møta fólki, har tey eru, sigur Uni Næs.

## 1 prestur til hvørji 1000 fólk

*Hvørjar verða høvuðuppgávurnar hjá bispi?*

- Bispur skal vera góður at fara til í andligum og fyrisitingarligum viðurskiftum og vera kveikjari. Bispur er fyrst og fremst prestur og skal fáa kirkjuna at virka. Bispur skal vera formidlari og hava víðan sjónarring í øllum málum og verja grundarlagið, kirkjan byggir sína læru á.

- Bispur er umsjónarmaður í andligum og verðsligum málum. Tað vil siga í teimum málum, sum hava við fyrisiting hjá kirkjuni at gera, og hann eigur at tryggja, at prestarnir og tey, ið annars hava eina tænastu í kirkjuni, trívast í starvinum, sigur Uni Næs.

Hann greiðir frá, at sambært honum átti eingin sókn at ligið í prestaloysi, og at útjaðarin eigur at fáa støðuga prestatænastu. Best hevði verið, at tað var ein prestur til hvørji túsund fólk.

- Ein prestur átti at komið dagin eftir, ein annar er farin úr starvinum, sigur Uni Næs.

## Kirkjuting

*Hvørjar verða tær størstu avbjóðingarnar hjá føroysku fólkakirkjuni næstu árini?*

- Kirkjan má halda fast við lærugrundarlagið, sum er evangeliskt-lutherskt, sigur Uni Næs, sum heldur, at tað leikar hart á í hesum tíðum.

- Vit mugu halda fast við etisk virðir, sigur Uni Næs, ið heldur, at tað dupulta kærleiksboðið er neyðugt, tá hugsast og svarast skal upp á spurningin innihaldsliga.

Av meira ítøkiligum viðurskiftum nevnir Uni Næs, at frálæran í kristni skal styrkjast, og at neyðugt er at vera við í millumkirkjuligum og altjóða kirkjuligum samstarvi. Harafturat skulu vera góð viðurskifti við aðrar kirkjur samkomur í Føroyum.

Tá Uni Næs svarar spurninginum omanfyri frá einum meira strukturellum sjónarhorni, kemur hann m.a. inn á skipan og bygnað.

- Tað eigur at vera greiður skilnaður millum tað andliga og verðsliga valdið, so ikki ov nógv uppíblanding verður.

- Kirkjufólkið hevur ongantíð havt eitt forum, har viðurskifti hava verið umrødd, sigur Uni Næs, ið skýtur upp, at møguliga eiga vit at hava eitt kirkjuting av og á.

Hann fegnast um, at Felagið fyri kirkjuráðslimir hevur gjørt eitt stórt arbeiði at kunnað um kirkjuna, men hann heldur eisini, at kirkjutænarar áttu at verið limir í felagnum.

Uni Næs metri tó, at biskupsvalið á hesum sinni hevur ført valevnini kring landið og hetta hevur gjørt, at fleiri bóltar um kirkjumál hava verið uppi og vent í luftini, sum hann tekur til.

## Livandi steinur

Uni Næs metir tað ikki vera eina sjálvfylgju, at Fólkakirkjan fer at fáa serrættindi í framtíðini.

- Tað er ein stór avbjóðing, hvussu Fólkakirkjan skal vera kirkja í einum pluralistiskum ella multireligiøsum samfelagi.

Hann hevur sínar avgjørdu meiningar, tá talan er um, hvussu kirkjan skal fíggjast í framtíðini.

Prestur metir, at ein greining skuldi verið gjørd av fíggjarviðurskiftunum, men minnir á, at kirkjan ikki má blíva ein forngripagoymsla ella ein skjalagoymslu. Vit skulu varða um kirkjubygningarnar og gomlu bøkurnar, men vit eiga onga løtu at gloyma, at kirkjan er ein kirkja við livandi steinum, fólki, har andin gevur orðinum lív.

Uni Næs sigur, at heldur enn at grenja um pengar, átti kirkjan at greinað, hví hon hevur tørv á pengum.

- Tað má ikki stranda upp á tað, sigur Uni Næs og sipar til, um onkrari kirkju vantar pening til eitthvørt. Hann heldur ikki, at fólk høvdu meldað seg úr Fólkakirkjuni, hóast kirkjuskatturin hækkaði upp í t.d. 1%.

- Mær vitandi hava fólk ikki meldað seg út, hóast kirkjuskatturin hækkaði á nýggjarinum frá 0,4 til 0,6 %.

## Atgongumerki til kirkjukonsertir

Tá ið tað er talan um útreiðslur hjá kirkjuni, so eigur landið eisini at gjalda útreiðslur, sum hava við fyrisiting hjá kirkjuni at gera, tí enn gera prestarnir eitt stórt arbeiði fyri allar borgarar t.d. við at umsita og skriva kirkjubøkurnar.

- Tað eru nógv góð argument fyri at hækka kirkjuskattin. Men innsavningar kunnu eisini gera tað, sigur Uni Næs, sum heldur, at stór klassisk verk, sum eru skrivað til kirkjusang og kirkjutónleik, áttu at verið framførd í kirkjunum.

*- Kirkjurnar eru fín rúm, hví ikki skapa eitt umhvørvi?*

- Men so kundi fólk eisini fingið eitt orð við á vegnum, tí annars kundi tað sama verið farið inn í ein konserthøll, heldur Uni Næs.

Prestur spyr, um tíðin ikki er komin til, at møguleiki skuldi verið fyri at tikið pening fyri atgongumerki til slíkar konsertir, men ásannar, at hetta krevur eitt kjak. Og kjak heldur hann, vit hava brúk fyri.

Uni Næs heldur í høvuðsheitum, at fólk høvdu viljað goldið meira í kirkjuskatti, um tey sóu, hvat tey fingu burtur úr hesum peningi.

- Hvussu kunnu vit virka sum kirkja, kunnu vit spyrja, og tá er týdningarmikið, at ovasta leiðsla virkar sum inspirator, sigur biskupskandidaturin.

- Kirkjan má vera eitt andingarhol, sigur Uni Næs, sum heldur, at kirkjan er komin væl fram í ljósmála undir hesum biskupsvalinum.

- Hetta hevur verið spennandi at verið við í, sigur Uni Næs um valdystin higartil.

**Sosialurin prentar í hesi vikuni samrøður við øll valevnini til biskupsvalið. Í dag verður prátað við Una Næs, sóknarprest**